# Talvborðsdansur

**Í lýggja kvøldarveðrinum hóskvøldið dansaðu nakrir limir úr dansibólkinum, Dansihugni, í Klaksvík á talvborðinum í Vágstúni**

FÓLKADANSUR
*Solby A. Eliasen*


*Limir úr fólkadansarabólkinum, Dansihugni, í Klaksvík tóku ein "swing om" á talvborðinum í Vágstúni í lýggja kvøldarlotinum hóskvøldi*

**Klaksvík:** Um níggjutíðina hóskvøldið savnaðust einir 20 limir úr dansibólkinum Dansihugni á talvborðinum í Vágstúni. Tey dansaðu fólkadansir til tónleik, sum streymaði út úr anlegginum, sum tey sjálvi eiga.

Fischer Johannesen er formaður í Dansihugna. Hann sigur, at hetta var púra spontant. Tey luftaðu tankan fyri nøkrum av limunum, og so varð gjørt av at fara at dansa eftirsum at veðrið var so avbera gott.

Nógv fólk gingu og spákaðu í býnum, og tey steðgaðu so á at hyggja. Væl lá fyri hjá dansarunum, og tað sást á øllum brøgdum, at hesi njóta at dansa.

Fischer sigur, at tey hugsaðu um at hava frían dans, men gjørdu so av ikki at hava tað.

– Tað hevði verið trekt at fingið nakran at dansa bara soleiðis av gøtuni. Tað hava vit royna áður, og tað var sera trekt, sigur hann.

Eitt nú royndi hann, tá kommunan bjóðaði borgarunum morgunmat fyrst í juli mánaði. Tá spældi countrybólkurin, og Fischer saman við øðrum treiv í dans. Men tað løgdust ikki so mong afturat, og gjørdi tað helst sítt til, at tað bert vóru limir úr Dansihugna, sum dansaðu hóskvøldið.

Tey byrjaðu at dansa um hálvgum tíggjutíðina og hildu á líka til klokkan ellivu. Tey høvdu ein stuttan kaffisteðg í garasjuni hjá Ásu Waag, sum er ein av limunum. Hon býr í Vágstúni, so tað lá væl fyri.

– Ása var líka sum primus motor hetta kvøldið, tí hon býr beint har, so vit fingu eisini streym til anleggið frá henni, sigur Fischer.

Dansihugni er annars í summarfrí nú, men kortini vóru ein triðingur av limunum savnað hetta kvøldið.

Tað eru 60 limir í Dansihugna, og umleið 40 av teimum plaga at møtast til dans hvørt leygarkvøld gjøgnum veturin. Tey dansa vanliga skotskar, norskar og svenskar fólkadansir.














# NATO-málið aftur í brennideplinum


*Málið hevur verið í áravís um fíggjarligu viðurskifti okkara við NATO. Rættast hevði verið at gjørt verður upp og kanna málið til botns, halda fleiri*

**Síðsta orðið er neyvan sagt í málinum um, hvønn týdning Føroyar hava havt fyri verjuútreiðslurnar hjá Danmark í NATO. Tjóðveldismenn halda tað vera í tøkum tíma, at málið verður tikið upp, um neyðugt á Fólkatingi. Jóannes Eidesgaard heldur tjóðveldismenn sakna rumbul, men hevur annars onki ímóti, at málið verður avklárað**

VERJUMÁL
*Ingi Rasmussen*

Kravið um eina fíggjarliga uppgerð millum Føroyar og Danmark er aftur um at reisast. Tað kemst av, at ljós er varpað á, at Anders Fogh Rasmussen forsætisráðharri er komin at standa í andsøgn við tað, sum fleiri fyrrverandi danskir ráðharrar hava sagt.

Jens Otto Kragh, Uffe Ellemann Jensen og Hans Engell hava allir til felags, at teir hava verið danskir ráðharrar við innliti í donsk verjumál. Teir hava eisini tað til felags, at teir hvør sær hava framborið, at Danmark slapp lættari í limagjaldi til NATO, tí teir góvu verjusamgonguni landaøki í Grønlandi og Føroyum at ráða yvir.

Hesum hevur forsætisráðharrin anno 2003 kortini víst aftur við orðunum, at »Danmark har på intet tidspunkt unddraget sig udgifter i NATO som følge af Færøernes status og placering,« tá Føroyanevndin hjá Fólkatinginum spurdi seg fyri.

Málið hevur javnan verið frammi síðstu árini, tí føroyingar hava viljað prógvað, at blokkstuðulin úr Danmark ikki er nøkur olmussa, men eitt gjald fyri vald og góðar treytir í heiminum.

Nú er aftur politiskt rumbul um at koma burturúr málinum.

## Ein nýggj støða

Anfinn Kallsberg løgmaður noktar at gera nakað við málið í løtuni. Tað er ikki á politisku dagsskránni, sigur hann, tí Føroyar og Danmark hava avtalað blokkstuðulin næstu árini. Samgongufelagin Jenis av Rana úr Miðflokkinum harmast og vil framvegis hava eina fíggjarliga uppgerð við støði í NATO-limagjaldinum.

Formaðurin í Uttanlandsnevndini hjá Løgtinginum, Hergeir Nielsen úr Tjóðveldisflokkinum, er í sama báti. Hann heldur ósamsvarandi upplýsingarnar vera so ørkymlandi, at tíðin er komin til eina uppgerð.

– Ferð eftir ferð hava danir víst hesum máli frá sær og hava ikki viljað viðgjørt tað, men nú fyriliggur ein nýggj støða. Sitandi forsætis- og verjumálaráðharri hava við ein munn sagt eini fólkatingsnevnd, at Føroyar og Grønland einki positivt íkast geva til danska búskapin, meðan undanfarnir ráðharrar í somu sessum søgdu tað øvugta, sigur Hergeir Nielsen.

Onkur sigur ósatt, staðfestir hann, og okkara samskiftið við danir tolir illa hesa tvístøðu frameftir. Tí er neyðugt at fáa greiðu á hesum máli, heldur hann, og tá tað ikki ber til í beinleiðis samráðingum, mugu aðrar leiðir troytast.

– Fólkatingsumboð okkara eiga sjálvandi at nýta hetta gylta høvið til at fáa greiðu á, hvør sigur satt, og hvussu fíggjarligu viðurskifti okkara í NATO-felagsskapinum hanga saman, sigur Hergeir Nielsen.

Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsumboð floksins, er av somu áskoðan, og um landsstýrið ikki vil brúka musklar í málinum, fer hann helst sjálvur at taka tað upp á Fólkatinginum segði hann Útvarpinum hóskvøldið.

## Skeivur pallur

Tað eru kortini ikki øll, sum halda, at Uttanlandsnevndin og Fólkatingið eru rætti pallurin til orðaskiftið. Formaður Javnaðarflokssins, Jóannes Eidesgaard, sum er limur í Uttanlandsnevndini, sigur Hergeir Nielsen tosa fyri seg sjálvan, tá hann tekur NATO-málið framaftur.


*Fólkatingssalurin er ikki staðið til eina uppgerð um NATO-útreiðslur, sigur Jóannes Eidesgaard, sum kortini heldur tað vera skilagott við einari neyvari lýsing*

– Eftir øllum at døma er tað vorðið ov friðarligt fyri tjóðveldismenn fyri tíðina, tí teir liva av konfrontatiónum. Eg havi onki ímóti, at málið verður tikið upp, men tað eigur at vera ein spurningur, sum landsstýrið tekur upp við donsku stjórnina. Landsstýrið hevur eftir øllum at døma eitt internt problem, tí løgmaður ikki vil, metir Jóannes Eidesgaard.

Sjálvur hevur hann kortini einki ímóti, at málið verður viðgjørt og lýst út í æsir, tí tað er við til at skapa seiglívaðar mytur millum Føroyar og Danmark.

– Tað er vorðið til pástandur ímóti pástandi, har sitandi ráðharrar hava eitt standardsvar, sum er øðrvísi enn tað, sum fráfarnir ráðharrar siga. Málið hevur tært í áravíst, og tað hevði verið gott fyri allar partar at fingið eina klárlegging. Tað hevði eisini verið ein fyrimunur fyri Danmark, tí so kundi hent seg, at tað kom fram, at Føroyar afturfyri at hava lagt land til verjuna av vesturheiminum, hava fingið eina verju, sum vit ongantíð sjálv høvdu megnað, sigur Jóannes Eidesgaard.

# Nógv herd vápnalóg á veg

**Øll tey, sum frameftir vilja ogna sær skotvápn, skulu hava loyvi frá fútanum. Tað er høvuðsendamálið við einari dagførdari vápnalóg, sum føroyska løgmálaráðið hevur sent til hoyringar**

VÁPNALÓG
*Ingi Rasmussen*

Síðstu árini hava verið fleiri tilburðir, har óvandalig handfaring av vápnum hava sett lív hjá fólkum í váða. Tað hevur fest í eitt afturvendandi kjak um, hvussu lætt tað er at ogna sær vandamikil vápn.

Higartil hevur borið einum og hvørjum, sum er fyltur 18 ár, til at fara í ein handil at keypa sær vápn. Nýggja vápnalógin, sum helst verður løgd fyri løgtingið í komandi tingsetu, hevur við sær, at fútin í hvørjum einstøkum føri skal loyva tær at keypa, innflyta ella eiga vápn. Talan er fyrst og fremst um skotvápn og pípur, sum kunnu skjóta út kúlur, høgl ella onnur projektil, t.v.s. riflur, skammbyrsur og høglbyrsur, men eisini onnur skotvápn eru umfatað. Tað verður eisini ólógligt uttan loyvi at keypa sær lóður til hesi vápn. Í nýggju lógini er revsingin fyri brot á vápnalógina eisini herd.

Tað er greitt, at føroyingar hava havt tætt tilknýti til vápn, tí nógv veiða fugl og harur. Men løgmálaráðið heldur, at nú føroyingar eru førkaðir longur frá veiðisamfelagnum, eru vápn alsamt meiri knýtt at harðskapi og minni til at matskaffa. Spurningurin er, um øll eru samd, men tey ósamdu sleppa eisini at gera vart við seg. Uppskotið er sent til hoyringar hjá ymiskum viðkomandi pørtum, men øll eru vælkomin at senda viðmerkingar, verður sagt av løgmálaráðnum.